# Toll- og Skattstova Føroya

## Tað ljóðar sum tónleikur í oyrunum!

## Nýggja kundatænastan leitar eftir **leiðara**

**So, hevur tú** tænastulyndi, kanst hava fleiri bóltar í luftini ísenn, tekur skjótar avgerðir, sært starvsfólkið sum eitt virðismikið tilfeingi, sært skipaðar loysnir sum eitt neyðugt arbeiðsamboð og dugir at seta teg í brúkarans stað, so er tað avgjørt tær, vit leita eftir.

**Vit vænta,** at tú hevur útbúgving á bachelor støði. Hevur tú skrivstovu-útbúgving, móttøkuútbúgving e.l. og hevur áhuga og vilja at víðari- og at eftirútbúgva teg, so ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Vit eru** ein stovnur í støðugari menning og virða meiningar og fjølbroytni hvør hjá øðrum. Virðini, mentanin og politikkir eru grundarlagið undir virkseminum á stovninum, hvørs endamál er í samsvar við misjónina, at:

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur.*
*Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta*

**Vit bjóða** eitt livandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiðspláss, har tað er vítt til veggja, og sum tillagar seg lógarbroyting og broyttum umstøðum. Tú kemur at arbeiða við at seta karmar um kundatænastuna saman við tínum starvsfólkum og stovninum annars. Eisini bjóða vit fleksarbeiðstíð.

**Høvuðsuppgávurnar** verða at leggja lunnar undir framtíðar menning av tænasturøktini á stovninum, har eingin dagur er eins, og har títt avrik kemur at viðvirka til nøgdari starvsfólk eins og nøgdari brúkarar.

**Starvið verður lønt** eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.
Setanarøkið umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóra á telefon 552620, sum er fús at svara spurningum.

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til Toll- og Skattstovu Føroya, í seinasta lagi 18. februar 2008, kl. 15.00. Viðmerk: umsókn leiðari til kundatænastuna.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Postsmoga 2151**
**FO-165 Argir**
**ella til tollskatt@tollskatt.fo**

stílað: Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóra

*Viðskiftafólk og starvsfólk hava rætt til ein virðiligan samverutóna!*

## Ert tú áhugaður í nøgdum viðskiftafólkum!

## Vit leita eftir fólki til ta nýggju kundatænastuna

so, um tú hevur tænastulyndi og er hugaður at møta viðskiftafólkinum, har tey eru stødd, so er tað heilt víst tær, vit leita eftir.

**Vit eru** ein stovnur í støðugari menning og virða meiningar og fjølbroytni hvør hjá øðrum. Virðini, mentanin og politikkir eru grundarlagið undir virksemi stovnsins, hvørs endamál er í samsvar við misjónina, at:

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur.*
*Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*

**Vit bjóða** eitt livandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiðspláss, har tað er vítt til veggja, men sum umframt skal tillaga seg lógarbroytingum og umstøðum annars. Eisini bjóða vit fleksarbeiðstíð.

**Vit vænta** at tú hevur eina móttøku-, tænastuútbúgving ella líknandi útbúgving innan tænastuyrki. Hevur tú skrivstovuútbúgving og ert sinnaður at víðariútbúgva teg, so ert tú eisini vækomin at søkja.

**Høvuðsuppgávurnar** verða at røkja kundatænastuna og at seta í journal.

Eingin dagur er eins á stovninum, og tí kann júst tín smidligleiki viðvirka til at gera allan munin.

**Starvið verður lønt** eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Setanarøkið** umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóra á telefon 552620, sum er fús at svara spurningum.
**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til Toll- og Skattstovu Føroya, í seinasta lagi 18. februar 2008, kl. 15.00. Viðmerk: umsókn fólk til kundatænustana.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Postsmoga 2151**
**FO-165 Argir**
**ella til tollskatt@tollskatt.fo**

stílað: Hjørdis Gaard, fyrisitingarstjóra

*Viðskiftafólk og starvsfólk hava rætt til ein virðiligan samverðutóna!*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevja innan málsøkini hjá stovninum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðuróki, Miðøki og Suðuróki halda til í ávikavíst Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Miðøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 60 starvsfólk.

www.tollskatt.fo
E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya

# Leiðslusamskipari

## er tænastuberarin á stovninum

**Ein leiklutur tú kundi hugsa tær!**

**Ert tú** royndur í leikum ella hevur tú hug at taka av eini nýggjari avbjóðing. Vit leita eftir einum framskygnum og ábyrgdarfullum leiðslusamskipara, sum trívist við støðugum avbjóðingum og hvørs leiklutur tryggjar støðuga menning í trá við misjónina hjá stovninum:

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*

**Vit bjóða** eitt livandi og fjølbroytt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins og har títt avrik kann gera allan munin. Vit hava fleksarbeiðstíð, og góðir møguleikar eru eisini fyri eftirútbúgving.

**Vit vænta**, at tú hevur útbúgving á bachelor støði innan fyrisiting, búskap, løgfrøði, mál, samskifti ella at tú hevur aðra líknandi útbúgving. Góðar málsligar førleikar, serliga í føroyskum máli og kanst taka tær av rættlestri av einum hvørjum slag. Eisini vænta vit, at tú dugir væl at samstarva og samskipa, tá ein av tínum uppgávum verður at leggja skeiðir til rættis.

**Høvuðsuppgávurnar** verða at arbeiða við lønar- og setanarmálum, fyriskipa fundir, skriva fundarfrásagnir, samskipa skeið og aðrar skrivarauppgávur . Sum heild vænta vit, at tú heilt natúrliga tekur eina hond í og ert beinasom/samur at taka við uppgávum og at stuðla leiðsluni í dagliga arbeiðinum.

**Starvið** verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Setanarøkið** umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Arnold H. Nielsen, stjóra á telefon 352600, sum er fúsur at svara spurningum.

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til Toll- og Skattstovu Føroya, í seinasta lagi 18. februar 2008, kl. 15.00. Viðmerk: umsókn leiðslusamskipari.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Postsmoga 2151**
**FO-165 Argir**

ella til tollskatt@tollskatt.fo

stílað: Arnold H. Nielsen, stjóra

*Vit vísa vælvild, áhuga og virðing og gera okkara besta fyri at menna eitt opið og nærverandi samskifti!*

## Avloysarastarv!

# Avgreiðslan á Posttollinum

søkir avloysara, sum er fúsur at veita viðskiftafólkunum góða og vegleiðandi tænastu, tað verði seg um telefon ella disk. Starvið verður sett so skjótt sum tilber og er fram til 1. september 2008.

**Vit eru** ein stovnur í støðugari menning og virða meiningar og fjølbroytni hvør hjá øðrum. Virðini og mentanin eru m. a. grundarlagið undir virkseminum á stovninum. Hvørs endamál er í samsvar við misjónina, at:

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur.*
*Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*

**Vit ímynda okkum** at tú hevur HH, skrivstovuútbúgving ella royndir innan tollarbeiði. Harumframt vænta vit, at tú ert ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og gert títt til at skapa arbeiðsgleði.

**Arbeiðsuppgávur:**
- samskifti við virkir og kundar
- kannan og edv-viðgerð av tollingaráheitanum
- vanlig tollavgreiðsla

**Vit bjóða** eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði, har hvør dagur er opin fyri fakligum avbjóðingum. Eisini kunnu vit bjóða fleksarbeiðstíðir.

**Setanartreytir** er Miðøkið, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Starvið verður lønt** eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag og er treytað av starvsroyndum, starvsinnihaldi og útbúgving.

**Áhugað**, ið vilja vita meira um starvið kunna venda sær til Herman í Stórustovu, deildarleiðara, á tlf. 352600.

**Send umsókn** saman við avriti av prógvum og ummælum til Toll- og Skattstova Føroya, í seinasta lagi 11. februar 2008, kl. 15.00. Viðmerk: Umsókn avloysari til Posttollin

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Postboks 2151**
**FO-160 Argir**

ella til tollskatt@tollskatt.fo

stílað: Eyðun Joensen, økistjóra

*Vit vísa vælvild og lurta, tá viðskiftafólk tørva hjálp*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevja innan málsøkini hjá stovninum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðuróki, Miðøki og Suðuróki halda til í ávikavíst Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Miðøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 60 starvsfólk.

www.tollskatt.fo
E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo